# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

| Mál nr. : 22/02800 | Lóg: Lóg um tryggingarvirksemi §§ 49 og 58 | Avgerð tikin: 24. apríl 2023 |
|---|---|---|

**Sýtt góðkenning av nevndarlimi**

**Samandráttur:**
**Kært er um, at Tryggingareftirlitið hevur sýtt at góðkenna kæraran sum nevndarlim grundað á atferðina hjá kæraranum sum fyrrverandi nevndarformaður í felagnum X. Kærarin førir fram, at hetta eru afturlítandi viðurskifti, og at atlit ikki verður tikið til ta uppgávu, sum hann skal røkja í hesi nevndini.**

**Føroya Kærustovnur metir, at til ber at staðfesta, at leiðslulig brek og vantandi eftirlýkan av boðum hava verið orsøk til trupulleikar í X í tíðarskeiðinum, tá kærarin hevur verið formaður í nevndini. Føroya Kærustovnur metir tí, at til ber at staðfesta, at kærarin sum formaður hevur sýnt slíkan atburð, at ivamál kann sáast um, hvørt viðkomandi fer at røkja uppgávuna sum nevndarlimur á nøktandi hátt.**

**Føroya Kærustovnur hevur tí avgjørt at staðfesta avgerðina hjá Tryggingareftirlitinu**

*(Viðmerkingar partanna og upplýsingar í málinum verða ikki endurgivin í fullum líki.)*

**Lógargrundarlag**
Løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**
Tryggingareftirlitið hevur í avgerð dagfest hin 7. desember 2021 tikið avgerð um ikki at góðkenna kæraran sum nevndarlim. Í nevndu avgerðini skrivar Tryggingareftirlitið í niðurstøðu síni:

> "Forsikringstilsynet finder efter en samlet vurdering af sagens omstændigheder, at klagerens adfærd som tidligere formand af bestyrelsen i X giver grund til at antage, at han ikke vil kunne varetage sit hverv som bestyrelsesmedlem på forsvarlig vis, jf. lagtingslov om forsikringsvirksomhed § 49, stk. 3, nr. 4. Klageren kan derfor ikke godkendes som bestyrelsesmedlem."

Ásett er í § 49, stk. 3, nr. 4, í lóg um tryggingarvirksemi, at nevndar- ella stjórnarlimir skulu lúka fylgjandi treyt:

> 4) Nevndar- ella stjórnarlimur má ikki hava sýnt ella sýna atburð, ið gevur orsøk til at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið ella uppgávuna á fullgóðan hátt. Tá ið mett verður um, hvørt ein nevndar- ella stjórnarlimur hevur sýnt ella sýnir skilaleysan atburð, skal dentur leggjast á atlitið at varðveita álitið á tryggingarøkið.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Í serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 3, nr. 4, sí løgtingsmál nr. 51/2012, § 1, nr. 57, framgongur millum annað um meting av førleika og heiðursemi:

> "Eftir nr. 4 fær Tryggingareftirlitið heimild til at leggja upp í mótvegis einum nevndar- ella stjórnarlimi, um viðkomandi hevur sýnt ella sýnir slíkan atburð, at orsøk er til at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja uppgávuna ella starvið á nøktandi hátt. Áseting verður m.a. at nýta, um so mikið nógv óskil er á fíggjarligu viðurskiftini hjá einum nevndarlimi ella hjá stjóranum, at júst hesi viðurskifti mugu metast serliga tyngjandi fyri røktina av yvirskipaðu leiðsluni av tryggingarfelagnum. [...] Annað dømi um skilaleysan atburð, ið áður er sýndur, kann vera í teimum førum, har tað er ivaleyst, at leiðslulig brek, vantandi eftirlýkan av boðum frá almennum myndugleika ella grovari misnýtslustøður hava verið orsøk til trupulleikar í teimum feløgum, har viðkomandi áður hevur verið partur av leiðsluni sum nevndarlimur ella stjóri. Tryggingareftirlitið skal harumframt framhaldandi meta, um leiðslan av einum tryggingarfelag fer fram á trygdargóðan hátt og skal leggja upp í, um nevndin ella stjórnin hava handlað til skaða fyri felagið. Hetta kann eitt nú vera støðan, um leiðsla felagsins ikki hevur tryggjað sær eina skikkaða kredittstýring, ikki hevur fylgt kravinum um góðar fyrisitingarligar mannagongdir og roknskaparmannagongdir, ella ikki hevur sett í verk nøktandi eftirlitsmannagongdir. Afturat hesum eru onnur føri, har vansketni, bráðræsni ella passivitetur hava skaðað tryggingarfelagið, ella har vandi er fyri, at hetta fer at henda."

Hvat viðvíkur atlitinum til at varðveita álitið á tryggingarøkið, framgongur av serligu viðmerkingunum til § 49, stk. 3, nr. 4:

> "Sum nakað nýtt skilst greitt, at atlitið til at varðveita álitið á fíggjarliga geiran skal vera partur av metingini av atburðinum hjá leiðsluliminum. Við hesum verður nágreinað, at atlitið til at varðveita álitið á fíggjarliga geiran skal vera partur av metingini av, hvørt ein limur í leiðsluni hevur sýnt ella sýnir slíkan atburð, ið hevur við sær vanda fyri, at viðkomandi ikki kann røkja sítt starv ella sína uppgávu á fullgóðan hátt. Eitt álit, sum krevur, at leiðsluliga rásarúmið er minni fyri stjóran ella nevndarformannin í einum tryggingarfelag, enn fyri persónar, sum leiða feløg í øðum vinnugreinum.
>
> Tað hevur higartil verið soleiðis, at sama proportionalitetsmeting hevur verið nýtt í sambandi við uppílegging eftir reglunum um førleika og heiðursemi í tryggingarlógini sum eftir ásetingini í revsilógini § 78, stk. 2, um persónar, sum útinna virksemi, ið er treytað av serligari almennari løggilding ella góðkenning. Verður henda meting nýtt, hevur tað tó við sær, at tað í praksis er nærum ógjørligt at leggja uppí mótvegis leiðslulimum, sum hava víst seg ikki at vera skikkaðar at standa á odda fyri einum tryggingarfelag, men sum ikki kunnu verða koyrdir úr leiðsluni við ávísing til tey meira objektivu staðfestandi metingarstøðini í § 49, stk. 2, nr. 1-3. Verður kravið í § 49, stk. 2, nr. 4, ið er ein meting, skúgvað til viks, er tað aloftast ikki proportionalt eftir núverandi proportionalitetsmeting í mun til § 79 í revsilógini um frádøming av rættindum. Tað hevur higartil verið metingin, at tað skulu vera greið tekin um, at felagið hevði verið fyri skaða ella at skaðin fór at henda beint eftir. Hinvegin hevði ein uppílegging móti einum leiðslulimi, hvørs gerðir ikki enn høvdu víst seg í fíggjarligum trupulleikum, ikki kunnað verið mett proportional.
>
> Við nýggju orðingini í stk. 2, nr. 4, verður staðfest, at atlitið til at varðveita og tryggja framtíðar álitið á fíggjarliga geiran skal verða tikið við, tá ið metast skal um

proportionalitetin í einari ítøkiligari meting ella í einari ítøkiligari uppílegging mótivegis einum leiðslulimi.

Fyri at varðveita álitið á fíggjarliga geiran krevst sostatt, at uppílegging kann fara fram, tá ið Tryggingareftirlitið, við støði í sínum royndum og sínum kunnleika til marknaðarviðurskiftini og tað ítøkiliga felagið, metir, at tað er ein ikki ótýðandi vandi fyri, at felagið innan fyri 2-3 ár ikki kann halda áfram við rakstri sínum, um ikki munandi broytingar verða framdar í leiðslu og rakstri felagsins. Afturat hesum kemur, at av tí at brek í leiðsluni og fíggjarligir trupulleikar í einum einstøkum tryggingarfelag hevur ávirkan á umdømið hjá øllum tí fíggjarliga geiranum og álit samfelagsins á fíggjarliga geiran, kunnu leiðslubrek í sjálvt smáum feløgum hava ávirkan fyri álitið á samlaðu vinnugreinina. Tí ber ikki til, bert tí at talan er um eitt lítið felag, ella eitt felag, sum arbeiðir innan fyri eitt avmarkað øki, at koma til ta niðurstøðu, at leiðslubrek ikki hava týdning fyri álitið á samlaða fíggjarliga geiran."

Í Vegleiðing nr. 1 frá 28. juni 2018 um krøv í løgtingslóg um tryggingarvirksemi til nevndarlimir og stjórnarlimir um førleika og heiðursemi (fit & proper) er nærri ásett, nær upplýsingar skulu latast Tryggingareftirlitinum og hvørjar upplýsingar skulu latast. Í nevndu vegleiðing framgongur undir pkt. 4.3 og 5.2:

*"4.3 Skift af hverv eller stilling*
Vurderingen af, om et medlem af bestyrelsen eller en direktør er egnet og hæderlig, skal foretages i forhold til hver enkelt stilling eller hverv, den pågældende besidder. Det er således muligt, at den samme person kan godkendes til en bestyrelsespost i én virksomhed, men ikke i en anden. Det skyldes, at kravene til det enkelte bestyrelses- eller direktionsmedlems viden, faglige kompetence og erfaring, samt den tid, der kan anses at være fornøden for at varetage hvervet, er skærpede for store og komplekse virksomheder. Ligeledes er kravene generelt større for direktionsmedlemmer end for bestyrelsesmedlemmer. Hvis et bestyrelsesmedlem eller en direktør tiltræder en stilling i en anden forsikringsvirksomhed, skal vedkommende sende et opdateret oplysningsskema for direktions- og bestyrelsesmedlemmer til Tryggingareftirlitið, der herefter foretager en fornyet vurdering af den pågældende i forhold til den nye stilling. Tryggingareftirlitið får via Skráseting Føroya meddelelse om ændringer i forsikringsvirksomheders bestyrelse eller direktion. Dette fritager dog ikke den pågældende fra selv at orientere Tryggingareftirlitið om ændringen og anmode om en fornyet vurdering.

[...]

*5.2 Vurderingen af bestyrelses- eller direktions medlemmets omdømme*
Et medlem af bestyrelsen eller direktionen anses for at have et godt omdømme, hvis andet ikke er påvist, og hvis der ikke er nogen grund til at nære begrundet tvivl om vedkommendes gode omdømme. Tryggingareftirlitið lægger alle relevante oplysninger til grund for vurderingen af, om bestyrelses- eller direktionsmedlemmet har et godt omdømme.

Medlemmet anses ikke for at have et godt omdømme, hvis vedkommendes personlige eller forretningsmæssige adfærd giver anledning til begrundet tvivl om vedkommendes evner til at sikre en sund og sikker ledelse af forsikringsvirksomheden. Denne vurdering baseres bl.a. på alle kriminelle og administrative overtrædelser, inddragelse af tidligere

> tilladelser, licenser eller lign., tidligere afskedigelser og baggrunden herfor. I vurderingen af medlemmets omdømme tager Tryggingareftirlitið hensyn til alvoren af overtrædelsen, den tid der er gået siden overtrædelsen og personens opførsel i mellemtiden, herunder om der er tale om gentagne overtrædelser. Specielt i forhold til direktører vil det være vanskeligt at opretholde tilliden til vedkommende, såfremt den virksomhed, som vedkommende leder, har modtaget gentagne påbud for manglende overholdelse af den finansielle lovgivning."

Í umrøddu avgerðini frá Tryggingareftirlitinum framgongur, at Tryggingareftirlitið í avgerð síni um ikki at góðkenna kæraran sum nevndarlim sambært § 49, stk. 3, nr. 4, í lóg um tryggingarvirksemi, hevur lagt dent á fylgjandi viðurskifti:

- Manglende opfyldelse af påbud
- Manglende indlevering af årsrapport og revisionsprotokol
- Bestyrelsens vurdering af egen risiko og solvens (ORSA)
- De fire nøglefunktioner

Um leiklutin hjá kæraranum skrivar Tryggingareftirlitið í avgerðini:

> "Klageren har været bestyrelsesformand i X siden 20xx. Han har således været formand for bestyrelsen i hele perioden, hvor Forsikringstilsynet har fundet, at ledelsen har udvist en uforsvarlig adfærd, som har bevirket, at X har gjort sig skyldig i grove eller gentagne overtrædelser af forsikringsloven.
>
> Der er bl.a. talen om:
>
> 1. Manglende opfyldelse af påbud fra Forsikringstilsynet i forbindelse med inspektionen i 2016, som efter tilsynets vurdering delvist skyldes, at arbejdet med opfyldelse af påbuddene i årene 2016 - 2020 ikke har været tilstrækkeligt forankret i ledelsen, som i udpræget grad har anvendt fremmed bistand, og at ledelsen har udvist manglende vilje eller evne til at håndtere påbuddene.
> 2. Manglende indlevering af årsrapport og revisionsprotokol i 2018 og 2020 kombineret med en utilfredsstillende regnskabsproces.
> 3. Manglende indberetning af ORSA for 2019 og manglende involvering af bestyrelsen i arbejdet med ORSA-processen før godkendelsen af ORSA den 22. juni 2020.
> 4. Manglende sikring af et effektivt risikostyringssystem og et effektivt internt kontrolsystem ved først den 22. juli 2020 at træffe beslutning om at etablere de fire nøglefunktioner, selv om kravet blev indført den 1. januar 2019.
>
> Herudover har klageren indtaget en rolle i den daglige ledelse i X, som ikke er i overensstemmelse med opgave- og ansvarsfordelingen mellem bestyrelse og direktionen som anvist i ledelsesbekendtgørelsen kapitel 2 og 3. Bestyrelsesformandens rolle kan medføre en svækkelse af bestyrelsens kontrolfunktion, når bestyrelsen skal vurdere om direktionen varetager sine opgaver på betryggende vis.
>
> Det følger af forsikringsloven § 58, stk. 1, at bestyrelsesformanden skal sørge for, at bestyrelsen holder møde, når dette er nødvendigt, og skal påse, at samtlige medlemmer indkaldes. Bestyrelsesformanden har således pligt til at tage initiativet. Det er

> Forsikringstilsynets opfattelse, at bestyrelsesformanden bl.a. skal sørge for relevant dagsorden, sørge for overholdelse af formalia og sørge for opfølgning af påbud mv.
>
> Det er Forsikringstilsynets vurdering, at klageren ikke har levet op til sin forpligtelse som formand for bestyrelsen, hverken når det gælder opfølgning af påbud, indlevering af årsrapporter, udarbejdelse af ORSA samt etablering af nøglefunktioner.
>
> Bestyrelsen er et kollektivt organ og indestår således enkeltvis for de handlinger og undladelser som bestyrelsen foretager kollektivt. Det forhold, at bestyrelsesformanden indtager en særlig rolle i bestyrelsen, medfører dog ikke, at det udelukkende er formanden, som har ansvaret for overholdelse af bestyrelsens forpligtelser. Det forhold, at klageren ikke skal varetage formandsrollen har ikke haft betydning for vurderingen af, at klageren ikke opfylder kravene til at kunne godkendes som bestyrelsesmedlem. Forsikringstilsynets vurdering af klageren er ikke baseret på, om han opfylder særlige krav til formandsrollen, men er derimod baseret på hans omdømme, dvs. Hans generelle adfærd i bestyrelsen i X, som giver anledning til begrundet tvivl om hans evner til at sikre en sund og sikker ledelse, jf. § 49, stk. 3, nr. 4 i forsikringsloven."

Advokatur umboðandi kæraran vísir á í kæruskrivi dagfest 3. januar 2022 og viðmerkingum dagfestar hin 21. oktober 2021 til ætlanarskrivið, umframt í eftirfylgjandi viðmerkingum, at avgerðin hjá Tryggingareftirlitinum er grundað á afturlítandi viðurskifti, uttan at taka støðu til ta uppgávu, sum kærarin skal røkja sum partur av nevndini og sum umboð fyri limirnar í X.

Advokaturin vísir á, at metingin hjá Tryggingareftirlitinum er út frá, hvat nevndin hevur gjørt og ikki ein ítøkilig meting av leiklutinum hjá kæraranum.

Gjørt verður galdandi, at Tryggingareftirlitið ikki hevur kunnað víst á skilaleysan atburð, sum hevur elvt til váðafullar dispositiónir. Víst verður á, at fleiri av teimum viðurskiftum, sum Tryggingareftirlitið leggur dent á, og sum páboð eru givin um, eru formlig viðurskifti, freistir og t.d. skjalfestingar, og ikki um váðafullar íløgur, at hava mist pening, brot á hvítvasklóggávu ella líknandi. Advokaturin vísir á, at umráðandi er at hava fyrilit fyri, at arbeiðið varð sett í gongd og mannagongdir niðurskrivaðar, hóast alt ikki kom á mál um eina leið. Sambært advokatinum er av týdningi at taka atlit til, at hóast allar mannagongdir ikki vóru skjalfestar, so merkti tað ikki, at mannagongdir ikki eru fylgdar og at viðurskiftini ikki áhaldandi vóru skipað og trygg.

Advokaturin vísir millum annað á, at kærarin sum formaður áhaldandi hevur arbeitt við at lúka tey páboð, sum X hevur fingið, og at páboðini alla tíðini hava verið tikin í álvara. Víst verður á, at stig vórðu tikin til at víðka X við nevndarlimum við serkunnleika og nevndin leitaði sær serkøna uttanhýsis hjálp, sum natúrligt er, tí X ikki hevði eina so stóra umsiting.

Advokaturin vísir harumframt á, at Tryggingareftirlitið hevur lagt stóran dent á, at onki nágreiniligt sæst í gerðabókunum frá seint á vári 2019 til á sumri 2020 um, at nevndin hevur arbeitt við at fáa írestandi páboð greidd. Advokaturin vísir á, at Tryggingareftirlitið tann 25. juni 2020 fekk drúgva frágreiðing um alt málið, sum vísti óansæð gerðabøkur, at øll útistandandi viðurskifti av týdningi vóru komin undir land, at X var væl fyri fíggjarliga, og at X fyrisitingarliga var skipað og virkaði á nøktandi og tryggan hátt. Sambært advokatinum vísir hetta, at nevndarlimirnir hava tikið sín leiklut í álvara og arbeitt við málinum í 2018 og 2019 og loksins leverað alt kravt tilfar í juni 2020.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Gjørt verður galdandi, at hóast talan er um fleiri páboð, so er ikki talan um brot, sum í sær sjálvum kunnu føra til, at ein nevndarlimur ikki kann metast at kunna góðkennast til nevndina.

Føroya Kærustovnur vísir á, at hvat viðvíkur meting av førleika og heiðurssemi (fit & proper) skal ein slík meting gerast tá nevndar- ella stjórnarlimur koma inn í leiðsluna av einum felag og um viðurskiftini seinni verða broytt. Ein slík meting skal vera konkret og individuel, og Tryggingareftirlitið metir um allar viðkomandi upplýsingar tá støða skal verða tikin til, um ein nevndarlimur hevur eitt gott umdømi.

Á fundi á Føroya Kærustovni varð millum annað ført fram, at heiðurssemi varð tikið frá kæraranum. Eins og júst er víst á, skal ein nýggj meting gerast í mun til eitthvørt nýtt starv ella sess viðkomandi tekur við. Føroya Kærustovnur vísir á, at Tryggingareftirlitið hevur heimild at leggja upp í mótvegis einum nevndarlimi, um orsøk er til at halda, at viðkomandi ikki røkir uppgávuna ella starvið á nøktandi hátt. Í hesum ítøkiliga málinum er talan um góðkenning av nevndarlimi, sum skal taka sæti í eini nýggjari nevnd, og tí skal ein nýggj fit & proper meting gerast av viðkomandi.

Í sambandi við tílíkar metingar, er neyðugt at líta aftur á atferð og avgerðir sum viðkomandi áður hevur sýnt og tikið, eins og tað er viðkomandi at hyggja at fyrrverandi nevndarsessum og gongdini í feløgum og grunnum, har viðkomandi hevur verið partur av leiðsluni sum nevndarlimur, stjóri ella formaður. Hetta fyri nærri at kunna meta um, hvørt viðkomandi uppfyllir krøvini um førleika og heiðursemi.

Føroya Kærustovnur vísir á, at sambært upplýsingum og viðmerkingum í málinum, og tí sum kom fram á fundi í Føroya Kærustovni tann 24. apríl 2023, tykist ikki ósemja vera um faktuellu viðurskiftini í málinum. Harafturímóti tykist ósemja vera um, hvønn týdning vantandi skjalfesting hevur fyri X, og í hvønn mun givnu páboðini vórðu nøktandi avgreidd.
Føroya Kærustovnur vísir á, at tað er av stórum týdningi, at mannagongdir og arbeiðshættir verða skjalfestar, og at arbeiðið hjá eini nevnd verður skjalfest, soleiðis at ivamál ikki taka seg upp hesum viðvíkjandi.

Hvat viðvíkur outsourcing og nýtslu av uttanhýsis konsulentum vísir Føroya Kærustovnur á, at onki er til hindurs fyri at nevndir leita sær uttanhýsis ráðgeving og bíleggur arbeiði frá uttanhýsis konsulentum. Tó er tað nevndin, sum hevur ábyrgdina, og hevur nevndin ábyrgdina av, at arbeiðið og uppgávurnar sum verða gjørdar, lúka krøv og treytir ásettar í viðkomandi lóggávu.

Føroya Kærustovnur vísir á, at tikið verður undir við sjónarmiðunum og grundgevingunum hjá Tryggingereftirlitinum um ikki at góðkenna kæraran sambært § 49, stk. 3, nr. 4, í lóg um tryggingarvirksemi.

Føroya Kærustovnur vísir á, at sambært skjølum og upplýsingum í málinum hevur tað í tíðarskeiðinum 2016-2020 gjøgnumgangandi verið trupulleikar við vantandi skjalfesting viðvíkjandi millum annað mannagongdum og protokollum frá nevndarfundum.

Harumframt hevur tað víst seg, at í tíðarskeiðinum frá 2016-2020 hevur nevndin í X ikki megnað at eftirlíka páboð og krøv latin í november 2016 á nøktandi hátt. Hóast upplýst verður, at nevndin áhaldandi hevur arbeitt við at fáa viðurskiftini í rætt lag og páboðini eftirlíkað, so

hevur tað víst seg ikki at vera nóg mikið, og komið var hartil, at Tryggingarráðið í juli 2020 metti treytirnar fyri at taka aftur loyvið at reka tryggingarvirksemi vórðu loknar.

Føroya Kærustovnur metir tað vera sera álvarsamt, at Tryggingarráðið hevur mett, at treytirnar fyri at taka aftur loyvið at reka tryggingarvirksemi, vóru loknar. X fekk tá møguleikan at leggja saman við øðrum ella at verða avtikið. Støðan var sostatt tann, at X undir øllum umstøðum mest sannlíkt ikki hevði fingið loyvið at hildið fram í sama líki og undir somu leiðslu, um ikki avgerð varð tikin um at leggja saman.

Føroya Kærustovnur metir tað harumframt vera álvarsamt og tekin um leiðslulig brek og vantandi fíggjarstýring, tá X kemur í gjaldføristrupulleikar og í august 2019 ikki longur hevur basiskapital til at dekka minimumskapitalkravið.

Ført verður fram, at X av sínum eintingum boðaði Tryggingareftirlitinum frá hesum og tók stig til at umleggja solidarisku skipanina. Hvat hesum viðvíkur vísir Føroya Kærustovnur á, at tað er álagt sambært § 59 í lóg um tryggingarvirksemi um beinanvegin at fráboða Tryggingareftirlitinum upplýsingar um viðurskifti, ið hava stóran týdning fyri framhaldandi raksturin av tryggingarfelagnum.

Føroya Kærustovnur metir tað í sjálvum sær vera álvarsamt, at X kemur í ta støðu, at tað ikki hevur basiskaptal at dekka minimumskapitalkravið, og avspeglar hetta í ávísan mun vantandi fíggjarstýring.

Føroya Kærustovnur metir vísandi til omanfyrinevndu viðurskifti, at til ber at staðfesta, at leiðslulig brek og vantandi eftirlýkan av boðum hava verið orsøk til trupulleikar í X í tíðarskeiðinum frá 2016-2020. Í hesum tíðarskeiðinum hevur kærarin verið formaður í nevndini. Føroya Kærustovnur metir tí, at til ber at staðfesta, at kærarin sum formaður hevur sýnt slíkan atburð, at ivamál kann sáast um, hvørt viðkomandi fer at røkja uppgávuna sum nevndarlimur á nøktandi hátt.

Føroya Kærustovnur hevur í meting síni tikið atlit til, at talan hevur verið um lítið felag við lítlari umsiting, og at kærarin í nevndini hevði tikið sæti sum vanligur nevndarlimur, og at nevndin er størri og øðrvísi samansett enn nevndin í X.

Føroya Kærustovnur hevur í hesum sambandi lagt dent á atliti til at varðveita áliti á tryggingarøkið. Mett verður ikki, at nevndarlimur, sum hevur sitið í eini leiðslu, sum ikki hevur megnað at eftirlíka boðum og páboðum frá eftirlitsmyndugleikanum, hevur sýnt vánaliga fíggjarstýring, og har Tryggingarráðið hevur mett treytirnar loknar fyri at taka aftur loyvið at reka tryggingarvirksemi, kann góðkennast sum nevndarlimur.

Hvat viðvíkur ítøkiligu metingini av kæraranum vísir Føroya Kærustovnur á, at gjøgnumgangandi er í málinum upplýst, eins og á fundinum í Føroya Kærustovni varð greitt frá, at nevndin, herundir formaður og næstformaður, hava arbeitt sera tætt saman og tykist uppgávubýti og mannagongdir fyri nevndararbeiðið ikki at hava verið greitt tilskilað. Av hesi orsøk hevur tað ikki borið til at skilja ímillum metingina, sum er gjørd í málinum hjá ávikavist næstformanninum og formanninum, sum sótu í leiðsluni í nevndini, og høvdu ábyrgdina av at lúka treytir, sum ásettar eru í viðkomandi lóggávu og eftirlíkar boðum frá avvarðandi myndugleikum.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Samanumtikið metir Føroya Kærustovnur at avgerðin hjá Tryggingareftirlitinum er í tráð við ásetingarnar í § 49, stk. 3, nr. 4, í lóg um tryggingarvirksemi og viðmerkingar til nevndu grein. Føroya Kærustovnur metir ikki, at grundarlag er fyri at seta til síðis avgerðina hjá Tryggingareftirlitinum.

**Føroya Kærustovnur hevur tí vísandi til omanfyri standandi avgjørt at staðfesta avgerðina hjá Tryggingareftirlitinum.**